Faroe Marine Products P/F
Postrúm 60
520 Leirvík

Tórshavn, hin 03. oktober 2006
Málnr.: 61005-200100430-53
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

Umhvørvisdeildin

Ískoyti til umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá P/F Faroe Marine Products í Leirvík

1. Góðkenning og heimild

Henda góðkenning av fýringsútbúnaði á P/F Faroe Marina Products er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Góðkenningin er eitt ískoyti til umhvørvisgóðkenningina, dagfest 12. apríl 2002, HS mál nr. 613-200100430-10.

Treytirnar í upprunaligu umhvørvisgóðkenningini eru framvegis galdandi óbroyttar.

2. Umsókn og viðgerð

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk hin 27. apríl 2006 umsókn um góðkenning av fýringsútbúnaði á virkinum hjá Faroe Marine Products í Leirvík. Umsóknin inniheldur tekningar og teknisk data fyri fýringsútbúnaðin.

Uppskot til góðkenning hevur verið til hoyring hjá Faroe Marine Products P/F og Leirvíkar kommunu.

Faroe Marine Products P/F hevði bert smávegis viðmerkingar, m.a. at eisini tungolja kann verða nýtt sum brennievni. Leirvíkar kommuna hevði onga viðmerking.

3. Lýsing av virkseminum

Bygt verður fýrrúm við 6 MW oljufýringsútbúnaði, sum fevnir um ketil, brennara, skorstein og oljutanga.

Undir oljutangan verður stoyptur tangagarður at taka ímóti møguligum spilli frá tanganum. Skorsteinurin er 15 metrar høgur.

Sum brennievni verður nýtt gassolja, tungolja og reinsað spillolja frá Spilloljuverkinum hjá IRF.

Virkið nýtir vanliga avlopsorku frá brennistøðini til turking av fiskahøvdum o.ø. Endamálið við útbyggingini er at hava neyðuga hitaorku tøka tá brennistøðin liggur still vegna umvælingar, eftirlit o.a.

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

4. Góðkenningartreytir

Umframt treytirnar í umhvørvisgóðkenningini fyri turkivirkið í Leirvík dagfest 12. apríl 2002, mál nr. 613-200100430-10, eru hesar treytir galdandi:

a) Útlát av dálkandi evnum í roykinum mega ikki fara upp um hesi markvirði:

Evni	Markvirði mg/Nm³ av turrum royki v. 10% O_2
Dust	30
NO_X roknað sum NO_2	110
CO	100

b) Svávulinnihaldið í tungolju, sum verður nýtt sum brenni, skal í mesta lagi vera 1,0 vekt-%. Svávulinnihaldið í gassolju, sum verður nýtt sum brenni, skal í mesta lagi vera 0,2 vekt-%. Aftan á 1. januar 2008 skal svávulinnihaldið í gassolju í mesta lagi vera 0,1 vekt-%.

c) Um spillolja verður nýtt sum brennievni, eru umframt markvirðini nevnd í a) hesi markvirði galdandi:

Evni	Markvirði mg/Nm³ av turrum royki v. 10% O_2
SO_2	550
HF	3
HCl	60
Cr, Cu og V	tilsamans 0,9
Pb	0,6
Ni	0,06
Cd	0,06

d) Útlát við roykinum skal kunna skjalprógvast við útrokningum út frá innihaldinum í brennievninum ella við roykmátingum.

e) Verður spillolja nýtt sum brenni, skal skipanin hava máti- og stýringsútgerð fyri O_2 til stýring av brenningini.

f) Um innihaldið av PCB/PCT í spillolju, ið verður nýtt sum brennievni, er hægri enn 10 ppm, skal hitin í brenningini vera í minsta lagi 1.200 °C í minsta lagi 2 sekund við í minsta lagi 6 % O_2.

g) Spillolja við meiri enn 50 ppm av PCB/PCT, má ikki nýtast sum brennievni.

h) Í seinasta lagi eitt hálvt ár aftan á, at oljufýringin er tikin í nýtslu, ella við næsta steðgi hjá IRF, skulu gerast kanningar av roykinum fyri at vísa um útlátstreytirnar eru hildnar.

i) Verður spillolja nýtt sum brennievni, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan krevja kanningar av nýttu spilloljuni fyri PCB/PCT og evnini, sum eru nevnd í talvuni í c).

j) Spillivatn og annað frárensl, sum kann vera dálkað við olju, t.d. úr tangagarði, skal gjøgnum hóskandi reinsiskipan, so sum olju- ella feittskiljara, áðrenn tað verður leitt í kloakk.

5. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin í umhvørvismálum við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

Avrit: Leirvíkar kommuna, Postrúm 42, 520 Leirvík
Landslæknin, Postrúm 9, 110 Tórshavn